# Ungdómur og ungdómsmál í skúlanum í Hvalba



*Tað fekk góða undirtøku, tá ið skúlin í Hvalba setti ung og heilsu á breddan ein heilan dag*

**– Fyri páskir var stórt ungdómstiltak í skúlanum í Hvalba, har rúsevni, heilsa og trivnaður, vóru á skránni**

UNGDÓMSTILTAK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú eitt kvøldið fyri páskir var ungdómur og heilsa í brennideplinum í skúlanum í Hvalba.

Allan dagin og um kvøldið viðgjørdu ung, foreldur, lærarar og serkøn ymisk evni, sum hava við ungdóm, heilsu, trivnað og rúsevni.

Tey, sum løgdu fram, vóru Lissi Hansen, Tórhild Bjarkhamar, Bjarta Vilhelm, Jens Jensen og Heðin Thomsen, sum løgdu síni sjónarmið fram Skúlin skipaði fyri evnisdegi um heilsufremjandi tiltøk, saman við umboðum fyri Landsmiðstøðina fyri Undirvísingaramboð, Bláa Krossi og øðrum.

Seinnapartin var tiltakið fyri lærarar og onnur, sum hava tilknýti til skúlan, og um kvøldið fyri foreldur og eldru næmingar skúlans.

Tað vóru Lissi Hansen frá Landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð, Tórhild Bjarkhamar frá Bláa Krossi, Bjarta Vilhelm, heilsusystir, Jens Jensen, politistur og gamli formaðurin í fyribyrgingarráðnum, Heðin Thomsen, sum skipaðu fyri innihaldinum í hesum tiltaki.

Endamálið við tiltakinum var, at skúli og heim í felag skulu stremba eftir, at børn og ung fáa ein tryggan, heilsugóðan og rúsfríðan gerandisdag.

Bæði seinnapartin og um kvøldið var tiltakið skipað sum ein Kafé, har luttakararnir høvdu eina hugnaliga løtu, har teir samstundis kundu ognað sær vitan við at lurta eftir teimum serkønu og seta teimum spurningar afturvið einum drekkamunni.

Lagt varð fyri við stuttum fyrilestrum um heilsu, rúsdrekka, royking og narkotika. Ein spurningur, sum varð umrøddur, var hvussu vit læra ung at seta mark fyri, hvat tey vilja vera við til.

Síðani fóru luttakararnir í bólkar, har hvør bólkur fekk ein seðil við ymsum spurningum, sum skuldu vera grundarlag undir kjaki.

Høvuðsevni var hetta: Hvørja støðu halda tit, foreldur eiga at hava til rúsevni?

Lívligt kjak var við borðini og bólkarnir smæddust ikki fyri at leggja sína niðurstøðu fram.

Bæði næmingar, foreldur og skúlin eru samd um,at hetta var eitt gott og gevandi tiltak.



*Ferðaskrivstovurnar eiga at standa fyri marknaðarføring, og kunningarstovurnar at taka sær av vørumenning, sigur Therese Turidardóttir Kreutzmann, sum rekur egna ferðaskrivstovu í Keypmannahavn*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Ferðaskrivstovurnar eru neyðugar

**Ferðaskrivstovurnar, sum eru fyrstar at fáa samband við kundan, eru ein lívsneyðugur partur av ferðavinnuni. Tí tað er har, tað uppsøkjandi arbeiðið verður gjørt. Kunningarstovur og privatfólk hava ikki møguleika fyri at lýsa, sum ferðaskrivstovurnar gera, sigur stjórin á føroyskari ferðaskrivstovu í Danmark**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Tað ber ikki til at hava ferðavinnu uttan ferðaskrivstovur, staðfestir Therese T. Kreutzmann, stjóri á føroysku ferðaskrivstovuni My Faroe í Keypmannahavn.

Hetta sigur hon í viðmerking til tað, sum Oda Andreasen, produktchefur hjá Stena Line, segði á ferðavinnufundi í Vágum páskaaftan, har hon legði upp til, at heimafólkið sjálvt skuldi fáa fatur á ferðafólki og royna at fáa tey til sín uttan um ferðaskrivstovurnar, sum fóru við ov nógvum pengum.

Oda Andreasen segði á fundinum í Miðvági, at tað er umráðandi hjá fólki í eitt nú Vágum, at tey fáa so nógv ferðafólk sum gjørligt til sín uttan um ferðaskrivstovurnar. Hon nevndi í hesum sambandi Mallorca sum dømi, har hon segði at tey stóru norðurlendsku ferðafeløgini fara við vinninginum frá teimum nógvu túsundstals ferðafólkunum, tey senda hagar, og at ov lítið liggur eftir til heimafólkið. Fólk eiga sjálv saman við eitt nú kunningarstovum at gera tað uppsøkjandi arbeiðið, sum skal til fyri at fá ferðafólkini at koma til sín, segði Oda Andreasen.

## Ósamd

Therese Turidardóttir Kreutzmann, sum rekur ferðaskrivstovuna My Fair í Keypmannahavn, er púra ósamd við Odu Andreasen í hesi meting hennara.

– Tað er burturvið at hugsa so, sigur Terese Kreutzmann. Tí tað er ikki júst fyri at hava nógvar pengar, kunningarstovurnar í Føroyum eru kendar. Fyri at náa ferðafólki, har tey búgva, og fáa tey til Føroya, skulu nógvir lýsingarpengar brúkast. Og tað gera ferðaskrivstovurnar, sigur hon og vísir til, at hennara felag í fjør brúkti hundraðtúsundavís av krónum bara til maknaðarføring.

Ferðaskrivstovurnar og kunningarstovurnar hava hvør sína uppgávu, vísir hon á. Ferðaskrivstovurnar fáa fatur á ferðafólkunum og syrgja fyri, at tey fáa hug at koma til ferðamálið, sum eitt nú kann vera Føroyar. Kunningarstovurnar eiga hinvegin at syrgja fyri, at tað, sum ferðafólkini koma til, er í lagi, sigur hon.

## Vørumenning

Heldur enn at fara at tosa um at loypa ferðaskrivstovurnar um, og sjálvur fara út at leita eftir ferðafólki, eiga tey, sum taka í móti fremmandafólki í Føroyum, tað verið seg kunningarstovur, ferðaleiðarar, gistingarhús ella onnur, at syrgja fyri eini veruligari vørumenning innan ferðavinnuna, sigur Therese T. Kreutzmann.

– Tað er ikki tað, sigur hon, at tey ikki gera tað, sum er. Tí føroysk ferðavinnufólk gera eitt gott arbeiði. Men tá tosað verður um at umganga ferðaskrivstovurnar, hava fólk helst misskilt okkurt.

Hesi fólkini, sum taka í móti ferðafólki, hava sum høvuðsuppgávu at syrgja fyri, at tað, sum ferðafólkini koma til, er í lagi. At túrurin, sum lýstur er, verður gjørdur, tá hann er lýstur. At umstøðurna at búgva eru tær, sum lýst er við o.s.fr.

Tað ber ikki til, at fólk koma langvegis frá eftir at hava goldið fyri eitt nú ein gongutúr um fjøll, fáa at vita, tá tey standa klár at fara til gongu, at túrurin er avlýstur ella útsettur, tí ferðaleiðarin er farin á fleyg, ella tí, at ov fá fólk hava teknað seg til túrin.

Slíkt er ov lítil virðing fyri vinnuni og ikki minst fyri tí, sum hevur goldið fyri at koma til Føroya at ferðast. Men tað er tíverri so, at slíkt kemur fyri, og tað eigur tað ikki, tí slík framfeðr biður ikki fólk um at koma aftur sigur Therese T. Kreutzmann.

# Fann fingur í matinum

Ein amerikonsk kvinna varð skelkað, tá hon týsdagin setti seg niður í eini matstovu í Kalifornia, fyri at ein njóta ein deiligan killirætt. Brádliga hevði kvinnan ikki mat í munninum, men ein menniskjafingur.

- Tað var toppurin av einum fingri, við allari neglini á. Kvinnan bleiv ógvuliga skakað, og spýði alt fyri eitt, tá ið hon sá hvat ið hon hevði bitið í, segði Joy Alexiou, talskvinna fyri heilsumyndugleikarnir í Santa Clara.

Starvsfólkini á matstovuni, sum hoyrir til ketuna Wendy's, koyrdu tann væl kókaða fingurin í frystiboksina, og ringdu síðani eftir løgregluni og heilsumyndugleikunum.

Aftaná at fingrarnir hjá starvsfólkinum vóru kannaðir, varð staðfest, at einki av starvsfólkinum hevði mist nakran fingur. Løgreglan tók tí fingurin við sær, fyri at gera gjøllari kanningar.

Løgreglan skal m.a. royna at fáa eitt fingramerki av fingratoppinum. Eisini verður kannað, um fingurin møguliga kann vera komin úr dósamati ella aðrari hálvtilvirkaðari vøru, sum er útvegað til matstovuna.

Heilsumyndugleikarnir siga at møguleikin er lítil fyri at fingurin kann hava veitt nakra smittu til kvinnuna – av tí at hann var so væl kókaður.